# Hvussu heimastýrislig vilja vit vera?

HØGNI HOYDAL



**Anders Fogh Rasmussen megnaði sera dugnaliga at bera sín boðskap fram á vitjanini í Føroyum, uttan at nakar setur spurnartekin við veruleikan aftanfyri. Hetta gevur okkum kærkomið høvi at endurskoða, hvar vit eru støðd politiskt í Føroyum**

Kenni tað sum ein stóran heiður, at danski forsætisráðharrin og Dimmalætting velja at brúka bæði forsíðu og eina heila opnu at seta spjaldur á undirritaða og at viðgera føroyskan politikk í sambandi við vitjanina í Føroyum í seinastu viku.

Boðskapurin hjá Anders Fogh Rasmussen var greiður og – eftir bókini – í trimum pørtum:

Danska stjórnin leggur seg ikki út í føroyskan politikk. Men annars heldur forsætisráðharrin, at uttanríkispolitisku ætlanirnar hjá meirilutanum í Føroyum eru skeivar. Hann vísir á, at uttanríkispolitikkur kostar nógvar pengar fyri fólkið í Føroyum, og at Danmark er nógv betur ført fyri at røkja okkara áhugamál úti í heimi – tildømis mótvegis ES, har Danmark hevur "lyklarnar", sambært samrøðuni í Dimmalætting.

Undirritaði verður skírdur at vera ímóti Danmark – ja, at "gera Danmark til eina skálkatjóð" – og ikki at vilja samstarva við Danmark. Og so koma vanligu spjaldrini um at fáa meiriluta fyri at fáa "keisara, uttanríkisráðharra, forseta" o.s.fr.

Ongir politiskir trupulleikar eru at loysa ímillum londini. Føroyskir og grønlendskir myndugleikar hava sjálvir skyldina av, at danska stjórnin brýtur eina avtalu við føroysku og grønlendsku stjórnirnar og atkvøður ímóti okkara áhugamálum í altjóða hvalaveiðinevndini. Ja, Norðuratlantsbólkurin hevur høvuðsábyrgdina av, at Danmark atkvøður fyri friðaðum hvalaveiðiøkjum (!).

**Norðuratlantsbólkurin stjórn í Danmark**
Eg taki hetta sum skemt á høgum stigi. Serliga tá vit so ofta hoyra um "javnbjóðis virðing" og "javnsettar partar". Tað er ein serliga stuttlig viðurkenning av Norðuratlantsbólkinum, at hann nú er vorðin stjórn í Danmark, og at danska stjórnin knappliga ikki hevur ábyrgdina av at útvega sær meiriluta fyri sínum politikki. Í øllum øðrum málum tryggjar stjórnin sær sjálvandi meiriluta saman við stuðulsflokkinum, Danska Fólkaflokkinum. Og mundi tað nú ikki vera hesin stuðulsflokkurin hjá donsku stjórnini, ið broytti hugsan í hvalamálinum, uttan at tað fekk nakrar avleiðingar?

Sera áhugavert er at eygleiða, hvussu Anders Fogh Rasmussen megnar at draga fjølmiðlarnar við sær. Í samrøðuni í Dimmalætting spælir blaðmaðurin virkið við og leggur enntá undirritaða orð í munnin um ikki at hava nevnt Danmark í einari samrøðu um ES, hóast tað kann prógvast, at tað er skeivt. Ósonnu upplýsingarnar verða síðani nýttir at seta spjaldur á undirritaða – og soleiðis gongur samrøðan sum eftir ánni...

Tí er nærum synd at órógva boðskapin og hetta dugnaliga spunaarbeiðið við fakta og veruleika.

**Hvussu um vit høvdu gjørt tað sama uttanlands?**
Men vit kunnu royna at ímynda okkum eina øvuta støðu:

Um ein føroyskur stjórnarleiðari fór á vitjan í øðrum landi og legði persónliga eftir einum ráðharra – og annars gjørdi greitt, at avtalurnar hjá eini meirilutastjórn í tí landinum um uttanríkispolitikk o.a. vóru skeivar.

Um ein føroyskur løgmaður fór á vitjan í – lat okkum siga Svøríki ella Noregi – og legði svenska ella norska uttanríkisráðharran undir at gera Føroyar til eina "skálkatjóð" – uttan nakra grundgeving yirhøvur.

Um ein føroyskur ráðharri fór á vitjan í einum øðrum landi við tí boðskapi, at orsøkin til, at føroyska stjórnin hevði brotið eina avtalu við tað landið, var teirra egna skyld, tí tey høvdu ikki gjørt nóg mikið fyri at ávirka parlamentariska grundarlagið undir føroysku stjórnini.

Rokni við, at vit tá høvdu fingið eina diplomatiska kreppu, og at bæði fjølmiðlar og onnur høvdu spurt um prógv og grundgevingar fyri slíkum boðskapi. Rokni somuleiðis við, at onkur hevði mett, at tað var at leggja upp til "konfrontasjón" og at skapa trupulleikar.

**Heimastýrisligheitin endurskapað**
Men soleiðis er ikki hjá okkum. Heldur kunnu vit rokna við, at um ein føroyskur politikari setir spurnartekin við framferðarháttin og útsagnirnar, so verður tað hinvegin lagt út sum "konfrontasjón" og at skapa trupulleikar.

Hetta prógvar eftir mínum tykki, hvussu heimastýrislig vit eru enn í 2008. Hvussu vit støðugt endurskapa heimastýrisligheitina í fjølmiðlum og politiskum orðaskifti. Verandi valdið skal altíð endurskapast og onki má broytast ella bjóðast av. Sannleikin liggur altíð onkra aðra staðni, enn hjá okkum sjálvum.

Og hvussu skal nakar virða okkum, tá vit sjálvi virða okkum so lítið?

Eg vil tí í allari friðarligheit loyva mær at seta nakrar spurningar og vísa á nøkur svar:

**Hvar og nær hevur undirritaði gjørt Danmark til "skálkatjóð"?**
Svarið er sjálvandi ongastaðni og ongantíð.

Veruleikin er hinvegin, at eg havi hildið langar røður, skrivað drúgvar greinar og givið eina heila bók út, har boðskapurin er greiður: Danmark røkir dugnaliga síni áhugamál, og onki løgið er í tí. Á fleiri økjum hava vit ymisk áhugamál og fortreytir, og har kann Danmark sjálvsagt ikki røkja okkara mál. Tí er neyðugt, at vit sjálvi taka ábyrgdina av okkara uttanríkispolitikki og samstarva sum vaksin fólk.

**Hvar og nær hava vit ikki viljað samstarvað við Danmark?**
Svarið er sjálvandi ongastaðni og ongantíð.

Veruleikin er hinvegin, at vit samstarva dúgliga við Danmark og nýta donsku uttanríkistænastuna allastaðni, har vit kunnu. Men vit vilja eisini byggja upp beinleiðis samstarv við onnur lond og felagsskapir undir egnum samleika, har vit hava áhugamál at røkja. Danska stjórnin er væl kunnað um hetta – og hon veit sjálvandi, at endamálið hjá okkum er at byggja upp okkara sambond, so vit eru tilreiðar at standa á egnum beinum sum sjálvstøðugt land.

**Hvar og nær hava Føroyar ikki roynt at fingið betri avtalur við ES gjøgnum donsku skipanina?**
Svarið er sjálvandi ongastaðni og ongantíð.

Veruleikin er hinvegin, at vit nú á 36. ári hava roynt at fingið betri avtalur við ES og aðrar felagsskapir gjøgnum donsku skipanina – uttan mun til, hvør hevur sitið í stjórn í Føroyum. Tað hevur gingið striltið og seinført. Bæði tí, at vit hava ikki gjørt okkum greiðar ætlanir, og eisini tí, at vit kunnu ikki rokna við, at Danmark sum eitt av nú 27 londum í ES, bara skal orna tingini fyri okkum.

Danmark verður alt meira bundið av ES-avgerðum sum eisini verða tiknar okkara vegna, hóast vit ikki hava valt hetta og tað stríðir ímóti okkara áhugamálum. Hvalaveiðimálið er bara eitt av mongum. Ikki minst nýggja ES-stýrisskipanin og at Danmark fer at atkvøða um at taka av síni fyrivarni mótvegis ES-samstarvinum, fer at leggja enn fleiri av okkara málum til ES at gera av.

Hetta noyðast vit at ásanna og loysa á ein siviliseraðan og demokratiskarn hátt, uttan at leggja tað út sum nakað stríð millum Føroyar og Danmark – ella við at háða persónar og politiskar flokkar.

**Uttanríkisráðið – amboð til samstarv**
Vit í landsstýrinum og Uttanríkisráðnum seta nú alla orku inn til at greiða okkara strategisku støðu mótvegis ES, EFTA og øðrum felagsskapum til tess at røkja okkara áhugamál. Hetta gera vit sjálvsagt við at røkja og knýta sambond bæði við Danmark, okkara næstu grannalond, og aðrar partar, har vit kunnu útinna felags áhugamál.

Hetta er eitt av endamálunum við at stovna føroyska Uttanríkisráðið. Og tað hevði verið eitt ómetaligt framstig, um vit kundu samst í Føroyum um hesi áhugamál – heldur enn at niðurgera hvønn annan. Tað ger bert okkara samráðingarstøðu vánaliga og fastheldur okkum í heimastýrisliga ongamannalandinum.

# SE & Hør journalistikkur og miseydnað tænastuveiting

JOHN JOHANNESSEN



**Eftir at familja mín og eg eru hongd út í pressuni í allar besta slaturblaðstíli, kenni eg meg noyddan at skriva hesar reglur fyri at greiða frá samskiftis mistakinum hjá Atlantsflogi í Kastrup sunnudagin, sum skandalupressan annars hevur givið konu míni og mær skuldina fyri**

Tað tykist púra greitt, at ein nýggjur stílur hevur tikið seg upp summa staðni innan journalistiska yrkið í Føroyum. Slaturblaðstílurin skal nú bjarga fjølmiðlum við reyðum tølum á botnlinjuni og onki er heilagt.

Hetta hevur kona mín merkt sviðan av, nú tað er sligið stórt upp á forsíðuni á bløðum, sum annars kalla seg seriøs, at hon valdi at fara í land aftur úr einum flogfari eftir niðrandi viðferð, sum hon ikki hevði ábyrgdina av. Harmiligt er tað, at øll familjan skal svíða fyri, at man er politikari í hesum landinum og sárandi er tað at merkja skaðafrøðina á forsíðuni á Dimmalætting og á kjaksíðunum hjá Norðlýsinum.

**Skeiv kunning**
Veruliga søgan er tann, at konan, 3 mdr. gamli Rani og eg sjálvur eftir tveir frídagar í Keypmannahavn sunnudag seinnapart skuldu til at innskriva okkum til kvøldflogfarið hjá Atlantsflog til Føroya. Tá uppdaga vit, at ferðaseðilin er útskrivaður til mánakvøld kl. 18.45 í staðin fyri til sunnukvøld, sum var ætlaður heimferðardagur. Vit skunda okkum til skrivstovuna hjá Atlantsflog í Kastrup, so tey kunnu rætta ferðaseðilin fyri okkum. Tað gera tey við einum kravi um, at vit rinda 1.200 krónur eyka. Fyri at vera púra vís í, at alt nú er í lagi, spyrja vit, um tað er vist, at sunnudagsflogfarið eisini fer úr Kastrup kl. 18.45, eins og upplýst er á okkara ferðaseðli um mánadagsflogfarið. "Ja, tað er púra vist. Hetta er sama fráferð, bara sunnudag í staðin fyri mánadag", svara tey handan diskin hjá Atlantsflogi í Kastrup.

Sjálvsagt velja vit at trúgva starvsfólkunum hjá flogfelagnum og seta ikki fleiri spurnartekin, tí nú byrjar vanliga stríðið, sum tú hevur, tá tú ert á einum flogvølli við einum smábarni. Ein stór blæa við kukki skal skiftast, meðan kuffertið skal innskrivast við eitt borð og barnavognurin latast inn í hinum endanum á terminalinum. So er tað trygdareftirlit, eitt blæuskift afturat og líka ein gáva, sum skuldi keypast heim við.

Men á veg inn í handilin klokkan 17.48 ringir telefonin: "Er tað John Johannessen? Hvat í verðini hugsar tú fyri tær? Her stendur eitt heilt flogfar og bíðar eftir tykkum", eru boðini úr hinum endanum. Tað er Atlantsflog, sum hevur ringt. Vit skilja ikki heilt boðini, tí fyri lítlari løtu síðani hava vit fingið greitt at vita, at okkara flogfar fer ikki fyrr enn kl. 18.45 og júst komin upp í fráfaringarhøllina, hava vit enn ikki fingið stundir at hugt upp á nakra av kunningartalvunum. Men vit renna við sjógv á baki út ímóti flogfarinum.

Komin til flogfarið, verður kona mín skeldað út av einum starvsfólki framman fyri einum fullum flogfari av fólki fyri at hava gingið og hugnað sær við at keypa tollfrítt, meðan flogfarið hevur bíðað eftir henni. Ferðafólk fara at rópa eftir okkum, og tá kennir hon seg so mikið órættvíst viðfarna, at hon ikki hættar sær við hesum flogfarinum við einum nýføddingi og sjálvsagt fari eg í land aftan á henni.

**Hendiligt mistak**
Vit koma til ta niðurstøðu, at orsakað av skeivum upplýsingum frá flogfelagnum, eru vit komin í hesa óhepnu støðu. Eg ringi til flogfelagið, og løtu seinni eru vit innskrivað til eitt flogfar, sum skal fara til Føroya kl. 21.30. Bæði vit, leiðslan í Atlantsflogi og starvsfólkini vóru kedd um hendingina. Men tað eydnaðist kortini at sleppa heim til Føroya við einum flogfari, sum tíverri mátti standa nátt í Egilsstaðum orsakað av vánaligum veðri í Føroyum. Tó skal viðmerkjast, at tænastan, kunningin og viðferðin á hesum túri var serstakliga góð og professionell.

Síðani hendingina havi eg havt samband við leiðsluna í Atlantsflogi av tí stóra fjølmiðlaáhuganum kring hetta lítla mistakið. Bæði Atlantsflog og vit hava somu uppfatan av, hvat fór fram, og hvørgin hevur nakran áhuga í at gera nakað hóvasták burtur úr hesum hendiliga óhappi. Orsøkin til hvøssu viðmerkingarnar frá strongdu starvsfólkunum komu av, at tey stóðu við einum seinkaðum flogfari og vistu ikki, at vit vóru skeivt kunnað av flogfelagnum sjálvum. Ta støðuna skilja vit væl.

**Óundirbygdar gølusøgur**
Serstakliga harmiligt er tað tó, at ávísir fjølmiðlar royna at bryggja óundirbygdar gølusøgur við dulnevndum keldum, har teir brúka feitar yvirskriftir á forsíðuni, sum teirri í Dimmu: "ATLANTSFLOG NÓGV SEINKAÐ AV LØGTINGSLIMI." Og løgið er tað, at Dimma inni í greinini sigur, at "tað eydnaðist ikki Dimmalætting at fáa fatur á John Johannessen fyri evstamark hjá blaðnum í dag". Telefonin hjá mær hevur verið opin alla tíðina síðani vit lendu í Føroyum mánadagin fyrrapart, og her hevur Dimma ikki ringt.

Tað er harmiligt, at bæði makar og børn hjá politikarum skulu verða brúkt í slíkum óseriøsum royndum at selja fleiri bløð. Hetta rákið er serstakliga harmiligt, og vónandi læra fjølmiðlar og fólk annars at virða privatlívið hjá politikarum og familjum teirra.